# Tekur málið í egnar hendur

*Privatfólk hava nú tikið stig til at byggja umlættingarstovn til fjølbrekað børn í Havnini, tí onki røkist fyri at tað almenna kemur so langt. Grundstykkið er útvegað, so nú er eftir at finna fíggingina*



**Í Havn eru eini 10 børn, sum eru so illa brekað, at tey hava bráfeingis tørv á stovni til umlætting. Eftir at hava roynt til fánýtis at fáa myndugleikarnar at gera ein stovn, taka foreldur nú málið í egnar hendur og taka stig til at byggja ein slíkan stovn**

PRIVAT FYRITAKSSEMI
*Áki Bertholdsen*

Ofta verður tikið til, at har tað privata ikki røkkur, má tað almenna trakka til.

Men tað er sanniliga eisini oftani øvugt, at har tað almenna ikki røkkur, má tað privata trakka til.

Tað er Tórhallur Ásláksson í Havn eitt dømi um.

Hann hevur roynt at fáa almennu myndugleikarnar at ásanna tørvin á einum umlættingarstovni til fjølbrekað børn.

Sjálvur eigur Áslakkur tveir brekaðar drongir, so hann hevur meiri enn nakar annar, merkt tørvin á einum slíkum stovni á sínum egna kroppi.

Men hann er ikki einsamallur. Bara í Havnini eru eini 10 børn, sum eru so illa fyri, at tey hava bráfeingistørv á einum slíkum stovni.

–Einasta tilboð, vit hava fingið, er at senda børnini norður til Klasvíkar á Dáan. men vit hava ikki hug til at brúka ein triðing av umlættingartíðini til at ferðast í, sigur Tórhallur Ásláksson.

## Málið í egnar hendur

Hann heldur avgjørt, at ein slíkur stovnur skuldi verið í Havnini eisini.

Men tá ið onki røkist fyri, at almennu myndugleikarnir fara í holt við at byggja ein slíkan stovn, hevur hann ikki gjørt mætari enn at taka málið í egnar hendur.

Hann er nú farin ígongd av sínum eintingum og hevur sjálvur tikið stig til at byggja eina slíkan stovn.

Herfyri søkti hann Tórshavnar Kommunu um grundstykki til ein slíkan stovn.

Málið varð fyri á býráðsfundi seinasta hósdag og har varð einmælt samtykt at ganga umsóknini á møti og at útvega grundstykki.

Á býráðsfundinum varð ført fram, at tað var ein landsuppgáva at byggja og reka ein slíkan stovn og at tað tí ikki verður kommunan, sum fer at byggja hann, ella at reka hann.

Tórhallur Ásláksson sigur, at nú verður so eftir at útvega fígging til stovnin.

Hann ætlar sær fyrst at vita, um tað ikki ber til at fíggja stovnin við pengum frá føroyska almannaverkinum.

Men ber tað ikki til, ætlar hann sær ikki at gevast fyri tað.

–Fái eg ikki almennu myndugleikarnar at taka undir við málinum og at byggja stovnin, fari eg at royna at útvega privata fígging til hann, og at søkja grunnar, olufeløg og hvat tað nú kann verða, um pening, sigur hann. Men hann heldur, at hetta er ein landsuppgáva og hann vil helst sleppa undan privatari fígging.

– Vit hava heldur ikki tíð til at arbeiða í fleiri ár við hesum málinum. Tað skal helst vera nú, áðrenn børnini eru vaksin og eg havi sett mær sum mál at stovnurin skal vera liðugur um eitt ár.

## Umlætting og viðgerð

Tórhallur Ásláksson sigur, at ætlanin er at talan skal vera um ein umlættingarstovn, men ætlanin er eisini at talan skal vera um ein stovn, har hesi børnini kunnu fáa viðgerð.

–Vit mugu royna at sannføra Almannastovuna og Almanna- og Heilsumálastýrið um, at tann peningur, sum nú verður brúktur til stuðul til hesi børnini hvør sær, hevði verið munandi betri farin, um hann allur verður brúktur til stuðul og viðgerð á einum slíkum stovni.

– Hóast hesi børnini hava stuðlar, eru tilboðini ikki nøktandi. Eg haldi eisini, at tilboðið og tænastan hevði verið nógv betri, um hesi børnini høvdu eitt ávíst stað at vera í og at tær viðgerðir og venjingar, tey høvdu tørv á, vórðu givnar har.

– Tað átti eisini at verið léttari hjá fysio- og ergoterapeutum, og øðrum. t komið á eitt stað at viðgerða børnini, heldur enn at flyta øll 10 børnini til viðgerðarstovurnar, sum vit nú gera.Tað er léttari at flyta eitt fólk, heldur enn 10 fólk, heldur Tórhallur Ásláksson.

# Stórur marknaðardagur í skúlanum í Trongisvági

**Allur peningurin, sum kemur inn, fer til nýggja bussin, sum Suðuroyar Ellis- og Røktarheim hevur keypt til búfólkið**

VÆLGERÐANDI ENDAMÁL
*Áki Bertholdsen*



*Her fara tær við einum vogni eftir gongini á Ellis- og røktarehiminum, fullum av dukkum, nissum, og øðrum jólapynti, sum skal seljast á marknaðardegnum í skúlanum í Trongisvági leygardagin*

Leygardagin verður stórur marknaðardagur í skúlanum í Trongisvági. Tað er Ellis- og Røktarheimið í Suðuroy, sum skipar fyri. Marknaðurin byrjar klokkan 15 og hildið verður so á, til alt er uppi.

Samstundis verður eydnuhjól, har vinningarnir eru jólagæs, krov og annað gott.

Á marknaðinum fara tey at selja nissur og alskyns annað jólapynt, umframt ymiskt annað. Tað allarmesta er slíkt, sum starvsfólk og búfólk á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, avvarandi hjá teimum, og onnur, hava gjørt sjálvi.

Hetta er aðru ferð, at Ellis- og røktarheimið hevur marknaðardag. Fyrru ferðina var í fjør, tá var dagurin á ellisheiminum sjálvum, men undirtøkan var so ovurhonds stór, at tað varð nakað trongligt hjá fólki.

Tí er tiltakið hesuferð flutt inn í skúlan í Trongisvági, har tað verður í stóru skúlahøllini og har umstøðurnar eru nógv betri.

## Savna til buss

Allur peningurin, sum kemur inn, skal brúkast til ein buss, sum Ellis- og røktarheimið hevur keypt til búfólkið.

Bussurin kom seint í summar, og tey hava longu verið onkrar útferðir við honum, eitt nú hava tey vitjað á sambýlinum í Hvalba og í Vági.

Talan er um ein lítlan buss, sum tekur átta fólk og tey eru ómetaliga fegin um at hava fingið hann.

Sigast kann ikki annað, enn at tað hevur gingið gott at sava pening saman til bussin, tí tey byrjaðu ikki fyrrenn í fjør.

Men enn manglar í og tað er hetta, tey vóna at kunna útvegað leygardagin.

Umframt at tey sjálvi hava savnað pening saman, er gávur, sum er lætnar Ellisheiminum í sambandi við andlát, brúktar til bussin, og harafturat hevur Lions Klubburin í Suðuroy eisini latið eina munandi upphædd.



VIÐMERKINGAR

# Fólkatingsvalið – ein veljarakanning!

**Fullveldissamgongan á løgtingi hevur mist meirilutan í fólkinum!**

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Tað var harmuligt, at Javnaðarflokkurin misti sítt umboð á Fólkatingi – og tað var ikki uppiborið, men angistin fyri loysingarpolitikkinum í Føroyum gav Sambandsflokkinum nógv størstu framgongdina – og tað er kanska at skilja eisini, meðan ríkisrættarliga støðan, sum er so aktuell, nú gav polarisering til Tjóðveldisflokkin og Sambandsflokkin.

Veljarin hevur altíð rætt, sjálvt um vit í Javnaðarflokkinum meta, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ikki fara at greiða ta loysn, sum Føroyar og Føroya fólk bíða eftir í sjálvstýrismálinum. Men tað fer tíðin so at vísa. Vit frykta fyri berari konfrontatión á danatingi við hesi umboðanini, tí Tjóðveldið og Samband hava næstan aldri kunnað samstarvað um praktiskan politikk.

Men ríkisrættarmálið skal tó í fyrsta og størsta mun loysast her heima á klettunum – í Føroya Løgtingi og í Føroya Landsstýri – við einum dyggum meiriluta av føroyska fólkinum aftan fyri loysnina.

Meta vit fólkatingsvalið sum eina veljarakanning, so hevur fullveldissamgongan á Løgtingi mist sín meiriluta í føroyska fólkinum. Teir tríggir samgonguflokkarnir fingu umleið 47% av atkvøðunum, meðan teir tríggir andstøðuflokkarnir fingu umleið 53% av atkvøðunum, harav teir báðir stóru flokkarnir, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, fingu umleið 51%.

Hetta merkir, at Føroya fólk tekur ikki undir við loysingarpolitikkinum hjá sitandi samgongu. Tjóðveldisflokkurin, sum gekk fram í mun til seinasta fólkatingsval, fekk als ikki ta undirtøku, sum veljarakanningarnar hava spátt og er ikki longur størsti flokkur í atkvøðum. Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin gingu báðir markant aftur.

Hetta má í praktiskum politikki viðføra, at ein meira hóvligur sjálvstýrispolitikkur eigur at verða loysnin á ríkisrættarmálinum, tí tað er vilji fólksins. Vit hóma væl ynski um eina broyting.

Tað er at vóna og vænta, at henda hóming verður enn greiðari til eitt komandi løgtingsval, hvar loysingarflokkarnir missa sín meiriluta, so skipast kann eitt annað og betri landsstýri við einum fyri Føroyar tryggari og munadyggari politikki.

Tjóðskaparromantikkur, ynskitankar, reyp og ovurkæti kann vera gott til eitthvørt høvi, men ikki í tí harða gerandisdegnum, tí slíkt kann ikki nýtast til at gjalda rokningar við. Vælferðin hjá okkum øllum í Føroyum, hon kostar pening, nógvan pening, tað er tann kaldi veruleiki, sum politikarar eiga at liva upp til. Hetta er krav fólksins.

Frælsi – verulig persónligt frælsi – býr í øllum føroyskum hjørtum. Og fólksins frælsi eigur at koma fyrst – frælsi hins einstaka. Fátækt og armóð fjøtra hitt persónliga frælsið, tí siga vit: Vælferð Føroya fólks eigur at vera fremsta málið fyri øllum politikki – ikki bjørt, romantisk hugtøk ella loysing her og nú.

# Um ferðslu og myrkur

TÍÐINDASKRIV

Ferðsla í myrkri er 2-3 ferðir so hættislig, sum ferðsla í dagslýsi. Serliga eru tað fólk til gongu, ið eru í vanda - í vanda at verða ákoyrd av bilum, sigur Ráðið fyri ferðslutrygd.

Ein vanlig misskiljing er, at fólk halda, at tey altíð verða sædd av bilførarum. Ljósini á bilunum tykjast jú so sterk, tú kennir teg rætt og slætt »baðaðan« í teimum, og tað er ein sannroynd, at tað ber til at lesa í bók í glæmuni frá einum bili, sum er 2-300 m. burturi.

Men hjá bilføraranum er støðan hin øvuta. Á myrkum vegi, har eingi gøtuljós eru, sær bilførarin í mesta lagi tað, sum fjarljósini hjá bilinum megna at lýsa upp, tað er 100 m - við nærljósunum er tað 30 m. Men ljósini á bilum eru í veruleikanum ikki sterkari enn so, enn at einans tað, sum er ljóst á liti, verður sjónligt fyri bilføraran.

Tí er sera avgerðandi, hvønn lit klæði okkara hava. Eitt fólk í ljósum klæðum kastar uml. 80% av ljósinum aftur, meðan eitt fólk í dimmum klæðum einans kastar eini 5% av ljósinum aftur til bilin. Endurskin harafturímóti, er gjørt úr tilfari, sum megnar at kasta næstan 100% av ljósinum, sum lýsir á tað, aftur til ljóskelduna.

(Kannið hetta okkurt vetrarkvøldið - ella vetrarmorgun, tá ið myrkt er!)

Bestu ráðini eru tí at vera í ljósum klæðum, tá ið tú skal út at ganga í myrkri. Hetta eiga foreldur at hugsa um, tá ið klæði verða keypt. Um so skuldi verið, at bara myrk klæði eru til taks, so minst í øllum førum til endurskin.

Við átakinum »Vit síggjast« hava næmingarnir í 1.-2.-3. og 4. flokki enn eitt endurskin til at taka!

## Stutt um endurskin

- Jú ljósari klæði vit hava, jú betri síggjast vit, keyp tí ljós vetrarklæði.

- Nýt altíð endurskin,tá ið tú skalt út at ganga í myrkri.

Nógv sløg av endurskini eru, umframt tey sum nú verða givin út til næmingarnar í 1.-2.-3. og 4. flokki. Niðanfyri eru nevnd nøkur dømi:

- Bleyt endurskin at seyma ella at líma á jakkar, buksur, venjingarbúnar o.s.fr.

- Endurskin at líma á skógvar og stúlvar, sum, hóast lítil, síggjast sera væl.

- Endurskinsspjøldur at hanga í klæðini, ella at festa í ein lumma, so tey kunnu goymast, tá ið tey ikki verða brúkt.

Eisini er gott er at seta endurskin á barnavognar, sletur, súkklur o.t. Og sjálvsagt skulu vit seta endurskin á tey fýrføttu, tað verið seg hund, kettu, hest og ikki minst seyð.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

# Hvannasund er stongt

**Landsdjóralæknin hevur boðað frá, at Hvannasund norðanfyri byrgingina er stongd fyri allari ferðslu vegna ILA smittuna**

ILA
*Stefan í Skorini*

Av tí at ILA er staðfest í einum aliringi hjá Faroe Salmon á Hvannasundi setir landsdjóralæknin fleiri forboð í økinum.

Tað er bannað at fiska í Hvannasundi norðanfyri byrgingina. Tað er somuleiðis bannað at landa fisk, ið er fiskaður í Hvannasundi norðanfyri byrgingina.. Harafturat er forboð hjá óviðkomandi at sigla nærri enn 500 metrar frá aliringunum hjá Faroe Salmon í Hvannasundi. Hetta skrivar landsdjóralæknin í tíðindaskrivi.

Forboðið er sett í gildi við heimild í lógini um djórasjúkur, um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum.

Bjørn Harlou, landsdjóralækni, sigur, at hesi forboð eru sett í gildi í øðrum økjum har ILA er staðfest.

Hann hevur frætt, at menn hava fiskað norðanfyri byrgingina, og tað er ein av orsøkunum til, at landsdjóralæknin setir hesi forboðini.

# Gera gøtu frá Oyggjarvegnum til Norðasta Horn

**Tórshavnar Býráð hevur samtykt at gera eina gongugøtu frá Oyggjarvegnum, oman á Norðasta Horn**

TRIVNAÐUR
*Áki Bertholdsen*

Tórshavnar Býráð hevur nú samtykt at gera ein gøtu frá Oyggjarvegnum oman á Norðasta Horn.

Umleið 960 metrar av gøtu vóru gjørdar, tá ið SEV legði kaðal frá Húsareyni til støðina við Krossin á Velbastaðvegnum.

Gøtan endaði oman fyri húsini hjá H. Rubeksen. Hiðani varð ætlan at fara víðari fram móti Norðasta Horni til ríðiøkið í Havnardali og runt um Vesturvarða. Eisini at fáa samband við Krossin á Velbastaðvegnum.

Málið byrjaði í 1998 tá ið Spastikarafelagnum søkti um gøtu til tey rørslutarnaðu at ríða á. Síðani tá hava bæði Byggi- og býarskipanarnevndin, Fìggjarnevndin og tekniska nevnd samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við umsókini.

– Gøtan verður nógv brúkt til gongutúrar, og vakurt útsýni er yvir býin og Nólsoyarfjørð, sigur Býráðið

Framhald av gøtuni er uml. 1550 m við teymum oman til Krossin og til býlingin á Norðasta Horni.

Tað arbeiðið er mett at kosta 775.000 krónur.

Á Býráðsfundi seinasta hósdag varð samtykt at játta 200.000 krónur í ár so at arbeiðið kann bjóðast út og byrja í ár.